

www.oljan.fo

**Jan Müller** 14 - 09 - 2012

# Bernanke sendi oljuprísin upp ígjøgnum

Tað fekk alt fyri eitt ávirkan á oljuprísin á altjóða marknaðinum, tá stjórin í amerikanska tjóðbankanum Federal Reserve, Ben Bernanke, í gjárlvøldið boðaði frá tiltøkum, sum skulu seta skunda undir vøksturin í amerikanska búskapinum. Boðskapurin hjá Ben Bernanke var, at Federal Reserve fer at keypa virðisbrøv, sum hava veð í fastari ogn, fyri 40 milliardir dollarar ella einar 230 milliardir krónur um mánaðin. Tað skal seta meiri ferð á búskapin, sum hevur ilt við at sleppa burtur úr fallinum. Boðskapurin hjá amerikanska tjóðbankastjóranum sást beinan vegin aftur á oljumarknaðinum. Prísurin á amerikanskari lættolju, sum skal latast í oktober, hækkaði 1,30 dollara upp í 98,31 dollarar fyri tunnuna, og Brent-olja úr Norðsjónum, sum skal latast í oktober, fór 0,94 dollara upp, so prísurin kom upp í 116,90 dollarar. So dýr hevur oljan ikki verið síðani tann 2. mai.